# Sjúkrarøktarfrøðingur til neurologiskt ambulatorium G3

**Eitt fulltíðarstarv er leyst at søkja til setan 15. apríl 2011. Neurologiska ambulatoriið er ein partur av Medisinska ambulatorinum, har arbeitt eisini verður við gransking.**

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- at ráðgeva, upplæra og vegleiða sjúklingar og avvarðandi
- at hava dagligu viðgerðina og røktina um hendi
- at arbeiða fyribyrgjandi og stuðlandi fyri sjúklingin og avvarðandi
- at arbeiða í tøttum tvørfakligum samstarvi við aðrar fakbólkar
- at verða við til at menna ambulatoriið

**Vit vænta at:**
- at tú hevur góð samstarvsevni
- ert jaglig/ur og opin fyri avbjóðingum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir í tøttum samstarvi við deildar- og depilsleiðslu

**Vit bjóða:**
- eitt starv, har tú sjálv/ur fært ávirkan á títt arbeiði
- møguleika fyri at menna teg fakliga eftir tørvi

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og autorisatión sum sjúkrarøktarfrøðingur
- kunnleiki til neurologi

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á Medisinska Deplinum, lsingga@ls.fo, tlf. 304599, lokal 6102 ella til Evu M. Holm, deildarleiðari á Medisinska ambulatoriinum, lsevamo@ls.fo, lokal 6250.

**Umsóknarfreistin er 7. mars 2011 kl. 12.00**

# Fysioterapeutur

**Søkt verður eftir fysioterapeuti til Fysioterapideildina til setan 1. apríl 2011 ella eftir avtalu. Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.**

Á Landssjúkrahúsinum eru ymiskar sergreinir, og er fysioterapi ein týðandi partur av viðgerð, sum er knýtt at hesum sergreinum.

**Vit bjóða:**
- eitt arbeiðsumhvørvi við skiftandi arbeiðsuppgávum
- engageraðar starvsfelagar
- fakligar avbjóðingar

**Vit vænta:**
- ágrýtni
- góð samstarvsevni
- opinleika og neyvt samstarv við aðrar fakbólkar

**Krøv til umsøkjaran:**
útbúgving sum fysioterapeutur við góðkenning

Á Fysioterapideildini eru 12.2 fulltíðarstørv. 1 leiðandi fysioterapeutur, 1 deildar-fysioterapeutur, 12 fysioterapeutar og 1 heilsurøktari, í alt 14 fólk.

Nærri fæst at vita um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a við at venda sær til Karin Djurhuus, leiðandi fysioterapeut, lskardj@ls.fo, tlf. 304599, lokal 5797.

**Umsóknarfreistin er 7. mars 2011 kl. 12.00**

Trivnaður

Størv á Landssjúkrahúsinum



Sjúklingurin í miðdeplinum

www.ls.fo

Gransking & menning

# Sjúkrarøktar-frøðingar til Medisinska ambulatorium G3

**Á G3 eru tvey fulltíðarstørv leys at søkja til setan 15. mars 2011 ella eftir avtlau. Møguleiki er fyri lægri brøki. Bæði størvini eru til røkt og viðgerðir innan onkologi, hæmatologi, reumatologi og gastroenterologi.**

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- kunna og vegleiða sjúklingar og avvarðandi innan nevndu øki
- tryggja eina kvalifiseraða viðgerð og eftirkanning av sjúklingum
- samskipa samstarv við aðrar deildir, primer øki og deildir uttanlanda, ið Landssjúkrahúsið vanliga samstarvar við
- kunna, vegleiða og undirvísa aðrar deildir um røkt og viðgerð innan nevndu øki
- sjálvstøðugar viðtalur
- ráðgeva um linnandi sjúkrarøkt
- geva kemoviðgerðir og aðrar biologiskar viðgerðir

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- kemoskeið, hetta er møguleiki fyri at nema við E-skeið
- faklig vitan innan økini
- minst 2 ára kliniskar royndir innan røkt og viðgerð á økinum
- góð tvørfaklig samstarvsevni
- arbeiða sjálvstøðugt
- flexibul og positiv

**Vit kunnu bjóða**
- eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- samskipaða innleiðslu
- fakliga kompetentar og virknar starsvfelagar
- tvørfakligt samstarv
- fakliga menning

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja 304500 til Evu M. Holm, deildarleiðara, lokal 6250, lsevamo@ls.fo ella til Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsingga@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 7. mars 2011 kl.12.00**

# Avbjóðandi størv sum læknaskrivari á Psykatriska deplinum

**Psykiatriski depilin søkir eftir einum læknaskrivara og einum leiðandi læknaskrivara til setan 1. mars 2011 ella skjótast gjørligt.**

Psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum er fyri alt landið og hevur 50 seingjarpláss við umleið 270 innleggingum árliga. Harumframt er rættiliga umfatandi ambulant- og økispsykiatriskt virksemi. Á deplinum verður arbeitt í toymis-skipan við samskipaðari røkt og viðgerð, har endamálið er, at borgarar fáa eitt dygdargott røktar- og viðgerðartilboð.

Sum læknaskrivari og leiðandi læknaskrivari verður tú partur av einum skrivaratoymi, sum í løtuni er samansett av einum leiðsluskrivara, fýra lækna-skrivarum og einum heilsu-skrivara. Sum partur av skrivaratoyminum fært tú møguleika fyri at vera við til at menna verandi tænastur. Leiðandi læknaskrivari verður fakligur leiðari av skrivara-toyminum.

**Til skrivaratoymið ynskja vit hesar kvalifikationir:**
- Útbúgving sum læknaskrivari
- Góðan hug til arbeiðið
- Er fleksibul og hevur áhuga í tvørfakligum samstarvi
- Umráðandi er, at tú megnar at arbeiða undir trýsti, tá á stendur
- KT førleiki og hug at seta teg inn í nýggjar arbeiðshættir, tá neyðugt er

**Til leiðandi læknaskrivaran ynskja vit harafturat:**
- Evni at raðfesta og skipa fyri
- Hug at leiða og arbeiða við starvsfólkamenning

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Eitt áhugavert arbeiðsøki undir støðugari menning
- Eitt fleirfakligt samstarv við psykiatarar, læknar, sálarfrøðingar, sosialráðgevarar, røktarstarvsfólk o.o.
- Møguleika fyri fakligari- og persónligari menning

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skrivaratoymið á tlf. 304500, lokal 4101 ella 4104.

**Umsóknarfreistin er 4. mars 2011**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

*Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:*

***Landssjúkrahúsið***
***Lønar- og starvsfólkadeildin***
***FO-100 Tórshavn***